# Graslíkisvøllir heldur enn Taffel Chips og MTV

Fyrr í summar vóru graslíkisvøllir tiknir í brúk á Norðasta Horni og á Hamrinum á Argjum. Hetta er øgiliga positivt heldur royndur fótbóltsvenjari, sum ræðist gongdina við MTV ættarliði, ið heldur vil hyggja at sjónvarpi og eta Taffel Chips, enn røra seg



*Tað var ein fegin Símun Absalonsen, sum vegna eigarafelagið kundi taka ímóti vøllinum*

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna gjørdi í summar graslíkisvøll á Norðasta Hornið og í samstarvi við UEFA vøll Hamrinum á Argjum, í fjør varð graslíki lagt á vøllirnar við skúlarnar í Kaldbak og Hoyvík. Hetta eru fyrstu stigini hjá kommununi við at gera vøllir kring alla kommununa.

Á seinasta býráðsfundi, vórðu játtaðar 2,6 milliónir til arbeiðið við at gera eini 10 verandi grúsvøllir til graslíkisvøllir. Hetta eru vøllir við graslíki av niðara vølli í Gundadali. Somuleiðis verður vøllur gjørdur í Folagerði við stuðli frá UEFA.

Sambært heimasíðuni hjá kommununi verður tann næsti UEFA-vøllurin vónandi gjørdur Millum Gilja komandi ár. Kommunan fær tillutaðan ein av 10 vøllum, sum fótbóltssambandið letur í 2005, og skal kommunan m.a. bera kostnaðin av planering, vatnburturveiting, asfaltering, stoyping av kantum og ljósi.

## Einasti graslíkisvøllur í Føroyum

Á samkomuni tá vøllurin á Norðasta Horni varð tikin í brúk, helt Símun Absalonsen røðu. Símun hevur sitið í eigarafelagnum á Norðasta Horni í nógv ár, og hevur verður primus motor í arbeiðinum við at fáa ein graslíkisvøll í hesi bygdini, ið ikki er ein bygd.

Símun tók ikki við afturvali, seinastu ferð nevndarval var í eigarafelagnum. Men sitandi nevnd, helt at hansara stríð fyri at fáa vøllin, hevði verið so mikið hart, at hann var rætti maður at halda røðu.

Símun sigur, at Norðasta Horn er í eini serstøðu. Talan er um ein part av Havnini, men millum Norðasta Horn og hinar partarnar av býnum er óbygt økið, á vegnum er loyvt at koyra 80 km/t, og økið annars er hagi. So hetta er sum ein egin bygd, við sínum egna bygdarlívið. Ein vøllur er ein sosialur savningardepil, ið mennir felagslívið í býarpartinum.

Norðasta Horn er hægst liggjandi bygda økið í landinum, hetta hóast tað bara liggur 3,5